# Fyrsta FM í Road-Racing



Hans M. Danielsen var sannførandi í kappingini hjá eldru koyrarunum



*Fyrsta almenna kappingin í Road Racing er nú liðug. Koyrt varð í fimm umførum, og fyrireikararnir tykjast fegnir um, at hetta bar til*

**Um vikuskiftið varð seinasta av fimm umførum í fyrstu FM-kappingini í sonevndari Road-Racing koyrd**

ROAD-RACING
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hetta er sum nevnt fyrsta ferðin, at slík kapping hevur verið hildin í Føroyum, tó at eitt royndarumfar varð koyrt í fjør.

Agnar Dahl, sum er ein av stigtakarunum til hetta, fegnast um, at tað við vælvild frá kommunalum myndugleikum hevur borið til at fáa eina slíka kapping í lag. Tað ber jú ikki til, soleiðis uttan víðari at skipa fyri eini slíkari kapping á almennum vegum, tí ferðin á motor-súkklunum man fyri tað mesta vera nakað omanfyri tað, sum ferðamarkið annars loyvir.

Trupulleikin hevur eisini verið uppi at vent fyrr, og eitt nú hevur tað verið ført fram, at kunnu slíkar kappingar ikki skipast undir tryggum viðurskiftum og innan lógarinnar karmar, so verður koyrt kapp kortini, og tá kann skaðin skjótt verða stórur, um slík kappkoyring fer fram á almennum vegum, har vanlig ferðsla eisini er.

## Fimm umfør

Kappingin hesaferð varð skipað í fimm umførum. Trý av hesum vórðu koyrd á Lambareiði, eitt í Miðvági og eitt í Hvalvík. Koyrt varð soleiðis, at ein breyt á nakrar hundrað metrar varð gjørd klár til koyringina, og síðani varð koyrt eitt ávíst tal av umførum.

Endaliga úrslitið gjørdist, at bæði hjá monnum og fyri old-boys gjørdist talan um suverenar vinnarar. Agnar Dahl vann øll fimm umførini hjá monnum, og í kappingini hjá teimum gomlu gjørdi Hans M. Danielsen honum kynstrið eftir.

Hjá kvinnunum var Eyð Ellingsgaard fremst í fyrstu trimum kappinginunum, men í seinasta umfarinum megnaði Maika Dahl tó at basa henni, sjálvt um hetta ikki var nóg mikið til samlaða fyrstaplássið.

MC-felagið, sum skipaði fyri hesi fyrstu FM-kappingini, arbeiðir annars framvegis við at fáa eitt sonevnt koyritekniskt anlegg í Føroyum.

Felagið sigur, at tey við hesum hava førarar av øllum akførum møguleika at fáa sær royndir við koyring í truplum støðum, uttan at hetta nervar vanligu ferðsluna, og at hetta tí er við til at økja ferðslutryggleikan í landinum.



Agnar Dahl vann somuleiðis øll umførini í kappingini fyri menn



Eyð Ellingsgaard vann samlaðu kvinnukappingina, men í seinasta umfarinum mátti hon tó lúta fyri Maiku Dahl

## Úrslit

### Senior

| NR | Luttakari | Lambareiði 22/5 | Lambareiði 19/6 | Miðvágur 14/8 | Hvalvík 28/8 | Lambareiði 11/9 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Agnar Dahl | 25 | 25 | 25 | 25 | 25 | 125 |
| 2 | Rúni Dahl | 16 | 20 | 20 | 13 | 16 | 85 |
| 3 | Heini Guttesen | | 16 | 13 | 16 | 20 | 65 |
| 4 | Kenneth Joensen | | | 16 | 20 | 13 | 49 |
| 5 | Allan Joensen | | 11 | 10 | 11 | 9 | 41 |
| 6 | Pætur Hentze | | 13 | 11 | | 11 | 35 |
| 7 | Sofus Jacobsen | 20 | | | | | 20 |
| 8 | Jóannes J Hansen | 13 | Dnf | | | 10 | 23 |

### Old Boys

| NR | Luttakari | Lambareiði 22/5 | Lambareiði 19/6 | Miðvágur 14/8 | Hvalvík 28/8 | Lambareiði 11/9 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hans M, Danielsen | 25 | 25 | 25 | 25 | 25 | 125 |
| 2 | Torbjørn Hansen | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 100 |
| 3 | Árni Hansen | 16 | 16 | 16 | | | 48 |
| 4 | Anfinn Hálsagarð | 13 | | | 16 | | 29 |
| 5 | Niels Kári Nielsen | | 13 | | | | 13 |

### Kvinnur

| NR | Luttakari | Lambareiði 22/5 | Lambareiði 19/6 | Miðvágur 14/8 | Hvalvík 28/8 | Lambareiði 11/9 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Eyð Ellingsgaard | | 25 | 25 | 25 | 20 | 95 |
| 2 | Maika Dahl | | 20 | 20 | 20 | 25 | 85 |
| 3 | Elna Madsen | | 16 | | | | 16 |



# Røður um at vera kendur



*Stjórin á Ferðaráð Føroya, Heri Niclasen, er nevndarformaður fyri ferðavinnusamtakinum í Útnorði, VestNorden Travel Board. Hann setti VestNorden Travel Mart ferðavinnustevnuna í Reykjavík mánakvøldið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað ræður um, at fólk vita, hvør tú ert, tá tú skalt selja teimum ein ferðavinnupakka. Tí verður nógv gjørt burtur úr at hittast undir hugnaligum umstøðum á VestNorden Travel Mart**

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

**Reykjavík:** Tað er skilligt, at fólk kenna hvørt annað, sum komin eru á ferðavinnustevnuna VestNorden Travel Mart. Somu andlitini ganga aftur, og tað kann hava sínar fyrimunir, tá avtalur skulu gerast.

VestNorden Travel Mart ferðavinnustevnan varð sett við einum hátíðarhaldi í Reykjavík mánakvøldið. Hjástaddir vóru millum aðrar íslendski ferðslumálaráðharrin, Sturla Bøðvarsson, og borgarstjórin í Reykjavík, Tórólf-ur Árnason.

Tað var formaðurin í nevndini fyri VestNorden Travel Mart, tað, sum nevnt verður VestNorden Travel Board, Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, sum setti stevnuna.

Hann beyð gestunum úr gomlum VestNorden londunum at vera vælkomnar á stevnuna, og fegnast seliga um at kunna bjóða bjóða gestum úr Hetlandi við á stevnu í Reykjavík.

Annar røðari við setanina var borgarstjórin í Reykjavík, Tólólfur Árnason, sum beyð gestunum at vera vælkomnum til Reykjavíkar.

Sum vera man eru umframt norðurlendsku ferðavinnufólkini eisini fremmandi luttakarar á stevnuni. Serliga europearar. Men eisini so langt burturi sum úr Australia plaga keyparar at koma, umframt nakrar amerikanarar, sum plaga at vitja stevnuna.

Íslendingar eiga enn sum áður góðar sangkreftir. Tað vístu teir eisini á hátíðarhaldinum í Reykjavík mánakvøldið. Musikskúlarnir munnu hava rímiliga góðar umstøður, um gingið verður út frá, at tey fólkini, sum sýndu síni kynstur á palli, eru skúlað í Íslandi.

Har vóru bæði jazztónleikarar og sangarar. Pianistar og trompetblásarar, og eitt heilt orkestur av smágentum millum átta og tólv ára aldur, sum spældu violin.

Men størsta fagnaðin fingu uttan samanbering teir báðir operasangarnir Davið Ólafsson, bass, og Stefán Helgi Stefánson, tenor, sum saman nevndu seg »Syngjandi fjarritið«.

Okkurt verður boðið til góman við slík høvi, og tá gevast góðir møguleikar at hitta fólk, sum tú aftur seinni á sjálvari messuni kanst koma á tal við, og møguliga fáa gjørt eina góða avtalu við.



*Tað ræður um at hitta nógv fólk og gerast kendur, áðrenn farið verður undir veruligar sølusamrøður á sjálvari stevnuni*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Borgarstjórin í Reykajvík, Tórólfur Árnason, í miðuni, var annar røðarin við setanina*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Reykjavík í sól

**Tað var sólskin í Reykjavík, og rímiliga lýggj var luftin eisini, tá føroyska ferðalagið, sum skal luttaka á VestNorden Travel Mart ferðastevnuni, kom til Reykjavíkar við fullsetta flogfarinum hjá Atlantsflogi**

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

**Reykjavík:**
Ferðavinnufólk í Útnorði hittast í hesum døgum til ta árligu ferðavinnustevnuna, sum nevnd verður Vest Norden Travel Mart. Stevnan verður í ár hildin í Íslendska høvuðsstaðnum Reykjavík.

Føroyska ferðalagið fór við flogfari hjá Atlantsflogi úr Vágum á middegi mánadagin, og lendi ein góðan tíma seinni í brennandi sólskini og stilli í Reykjavík.

Øðrvísi var heima á landi, visti onkur at siga, sum um fartelefonina longu á flogvøllinum í Reykjavík frætti, hvussu til stóð í føroyska illveðrinum.

Jú, munur var á, sannaðu fólk beinanveg, tá tey hoyrdu, at føroyski ferðavinnustoltleikin, Norrøna, noyddist á Skalafjørðin at kroka, og Landsverk ikki tordi at lat abilarnar koyra undir Leynaklivum, men lat teir sleppa gjøgnum tunnilin, sum arbeitt verður uppá, av ótta fyri áarføri og møguligum skriðulopi undir Klivunum.

Í Reykjavík verða fólk víst til ymsum gistingarhúsini, har haldast skal til, og so fara beinanveg í Laugardalshøllina, har stevnan verður hildin, at gera klárt, so fólk kunnu koma framvið mikudagin at fáa eitt ferðavinnuprát.

Onnur fara at royna at fáa internetsambandið at rigga, so samrøður, greinar og myndir kunnu sendast umvegis teldurnar til redaktiónirnar heima í Føroyum. Men tað gongur ikki væl. Hvussu væl íslendingar annars eru útgjørdir, tykist ferð eftir ferðat standa á at fáa líkinda internetsamband á hotellum og gistingarhúsum teirra. Og hóast teldufrøðingurin hjá hotellinum arbeiddi í ein tíma ella so, fekk hann ikki føroysku teldurnar og íslendsku stikkini at sampakka. So her máttu veljast aðrar loysnir, sum annars hildið var vóru avlagdar fyri einum tíggju árum síðan. Bara ikki í Íslandi letur til..

Tað eru gott 90 útbjóðarar við á stevnuni í ár, greiðir Heri Niclasen, stjóri í Ferðaráð Føroya og formaður í Vest Norden Travel Board, frá.

– Men tað, sum er avgerandi og umráðandi, er ikki, hvussu nógvir útbjóaðrar eru, men hvussu nógvir kyeparar møta upp,nháost neyðugt sjálvandi eisini er við útbjóðarunum, sigur hann.

Og hann hevur gott mót, hóast stevnan kanksa hevur tókst eitt sindur í minking seinnu árini. Tí nú tykist tað, sum at nógvir eysturEuropeiskir keyparar eru farnir at vísa útnorði alt størri áhuga, og tað er hugaligt, heldur stjórin á Ferðaráð Føroya.

Formanssessurin í Vest Norden Travel Board, sum Heri Niclasen í løtuni situr í, gongur upp á skift millum londini á sama hátt sum vertsskapurin ger tað. Aðruhvørja ferð er tað Ísland, sum eigur formannin, og aðruhjvørja ferð skiftast Grønland og Føroyar um formannin. Heri Niclasen hevur sitið sum formaður seinastu tvey árini, og á nýggjárinum tekur ein íslendingur við, og Heri Niclasen fer úr starvinum.



*Miðbýurin í Reykjavík við tjørnini og ráðhúsinum vístu seg frá síni bestu síðu, tá fremmandu ferðavinnugestirnir í stórum tali komu til bíggjar mánadagin. Verri var við internetsambandinum á hotellinum*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Fremmandamenn fáa sær eitt prát við lokala handilsmannin, sum hevur sett seg út um í góðveðrinum á Laugarvegi*
*Mynd: Edvard Joensen*